FSV-LÍF 1-0 (0-0):

# Albert og FSV eru har teir halda seg hoyra heima

**Endabresturin í heimadystinum, har uppflytingin varð staðfest, var ikki serliga hugaligur**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*



*Tað gekk hart fyri seg, tá vágamenn tryggjaðu sær matematisku vissuna fyri fyrstudeildarfótbólti, og millum annað vórðu fýra leikarar riknir av vøllinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

FS Vágar verður í bestu deildini komandi ár. Tað varð staðfest, tá teir sunnudagin á Valloyruni í Sandavági vunnu 1–0 á LÍF. Og tað varð eisini staðfest, at tað verður venjarin í ár, Albert Ellefsen, sum fer at hava ábyrgdina, tá FSV fer at royna at koma har, sum teir halda seg hava tilfar til at vera. Tað er millum fimm, seks tey bestu í 1. deild.

Tað verður arbeitt við at styrkja um liðið við spælarum aðra staðni frá. Enn er einki avgjørt, men tað hevur verið nevnt meiri enn eina ferð, at Tór–Ingar Akselsen aftur skal spæla við FSV, eftir at hann í ár hevur verið í HB.

Dysturin, har uppflytingin varð tryggjað, var ikki serliga áhugaverdur. Leirvíkingar, sum eru illa sperdir í hinum endanum av 2. deild, vóru komnir vestur eftir javnleikinum, og tað var um reppið, at tað eydnaðist. LÍF var í 3–6–1 uppstilling við Peturi Sjúrðaberg einsamøllum á toppinum. Setningurin var at taka ferðina úr spælinum, og tað eydnaðist væl. FSV hevði bóltin meiri, og teir høvdu møguleikar.

Serliga vandamiklir vóru teir í deyðbóltsstøðum. Tá tað restaðu tíggju minuttir fingu teir eitt mál kolldømt fyri rangstøðu, og LÍF bjargaði eina ferð í 2. hálvleiki á strikuni. Eftir horna smekkaði Jens Erik Rasmussen flatt framvið Karstini Joensen í LÍF málinum, men Tórhallur Justinussen bjargaði á strikuni.

Tá tað restaðu seks minuttir av vanligu leiktíðini varð pólverski Marek, sum er komin úr GÍ og til LíF, rikin av vøllinum, tí hann hevði fingið tvey gul kort. Tveir minuttir seinni ruku veteranarnir Terji Lervig hjá LÍF og Albert Ari Thomassen hjá FSV sama veg, eftir at teir høvdu heilsað uppá hvønn annan.

Og tá tríggir av teimum fimm minuttunum, sum vóru lagdir afturat, vóru farnir, dømdi dómarin brotsspark til FSV. LÍF spælararnir vóru í øðini. Teir hildu ikki, at dómarin átti at havt dømt brotsspark, tá ein av teirra afturi ímóti baklinjuni uttarlaga í brotsteiginum í vinstru fekk bóltin í hondina. Teir í Leirvík hildu, at flestu dómarar ikki høvdu mett, at einsamalli maðurin spældi bóltin við hondini, men heldur at bólturin støkk í armin.

Í allari øsingini sá Bárður Heinason reytt, tí hann hevði hevnt seg. Jens Erik Rasmussen umsetti úr ellivu metrum, FSV hevur tryggjað sær pláss í 1. deild, og LíF skal í trimum teimum síðstu umførunum stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting.

LÍF er triði niðast. Teir hava sama stigatal sum ÍF, og teir hava verri málmun. Men leirvíkingar eru omanfyri fuglfirðingar, tí teir hava betri innanhýsis úrslit. Dysturin í Fuglafirði endaði 1–1, meðan LÍF vann heimadystin ímóti íF 3–0.

### Dysturin í tølum

**FSV-LÍF 10 (0-0)**
1-0: Jens Erik Rasmussen (br.)

HB-B36 4-4 (2-3):

# Hvørki flutti seg

**Havnarliðini býttu stigini í Gundadali, og hvørki teirra flutti seg nakran veg á stigatalvuni, har tey stríðast í hvør sínum enda**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Nú bert trý umfør eru eftir at kappingarárinum í aðru deild, er av álvara farið at stramma hjá HB. Næst bestu menninir hjá teimum reyð/svørtu eru at finna á botnsessinum í aðru deild, og tað er sjálvsagt ikki nakað serligt, um menninir á besta liðnum komandi ár skulu leita niður í triðju deild eftir eykaleikarum. Serstakliga ikki nú tað er staðfest, at argjamenn fara at hava lið í aðru deild komandi kappingarár.

Sunnudagin var grannauppgerð í Gundadali, og eydnaðist tað HB at fáa eitt kærkomið stig, men í samlaða roknskapinum bøtti hetta lítið, tá allir kappingarneytarnir samstundis vunnu sínar dystir.

Fyrstu løtuna sá annars út til, at tað skuldi verða HB, sum fór avstað við øllum stigunum, tá fyrst Bjarni Jørgensen og síðani Bernhard Petersen sendu bóltiní B36-meskarnar.

B36'arnir vóru tó skjótir at svara aftur. Við tveimum málum frá Tórálvi Poulsen og einum frá Ragnari Poulsen fingu teir vent støðuni, soleiðis at tað var B36, sum var á odda, tá farið varð til hálvleik.

Í seinna hálvleiki helt javna dystargongdin fram. HB hevur nú í seinastuni roynt at fingið fleiri av gomlu fyrsta liðs kempunum at taka eitt tak við á næst besta liðnum, og tað var eisini ein av hesum, sum javnaði, tá Rói Árting skeyt sætta málið í dystinum, men nakað seinni var Ragnar Poulsen aftur upp á spæl.

HB fekk tó bjargað øðrum stiginum, og aftur var tað ein av veteranunum, hesaferð Gunnar Mohr, sum fekk seinasta orðið í dystinum.

Eitt kærkomið stig til HB, men sum sagt, so var gleðin um hetta stokkut, nú øll hini botnliðini vunnu sínar dystir, so nú er av álvara farið at stramma hjá HB.

B36 misti hinvegin ein møguleika at skræða seg leysan í stríðnum um silvurmerkini, men teir halda tó framvegis kósini.

**HB-B36 4-4 (2-3)**
1-0: Bjarni Jørgensen
2-0: Bernhard Petersen
2-1: Tórálvur Poulsen
2-2: Tórálvur Poulsen
2-3: Ragnar Poulsen
3-3: Rói Árting
3-4: Ragnar Poulsen
4-4: Gunnar Mohr

VB-Sumba 2-0 (1-0):

# Vágbingar tykjast tryggir

**Bæði ÍF og LÍF vórðu løgd afturum um vikuskiftið, og í øllum førum skal vilja heilt illa til, um vágbingar skulu flyta beinleiðis niður í triðju deild**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Stóran part av árinum tóktist tað so, at vágbingar bert skuldu fáa hetta eina árið í aðru deild. Liðið, sum í fjør var sannførandi í trið bestu deildini, hevði meira enn trupult við at fáa stig til høldar, og í fleiri førum var talan um rættiliga greiðar ósigrar.

Síðani summarsteðgin er tó vend komin í. Vágbingar hava spakuliga otað seg longur og longur upp á talvuni, og sunnudagin gjørdu teir aftur eitt lop, tá Sumba var á vitjan í grannauppgerðini.

Sumbingar hava í sínum lagi stríðst fyri rættingum at spæla upp- og niðurflytingardyst móti næst niðasta liðnum í fyrstu deild, men hendan sannroynd tóktist tó ikki at nerva vágbingarnar nakað serligt. Longu tíðliga í dystinum komu teir á odda, tá altíð vandamikli Birgir Jørgensen sýndi vælkenda máltevið, og so ráddi fyri tað mesta um at halda fast hjá heimaliðnum.

Eini grannauppgerð so líkt, so var talan til tíðir um hart spæl frá báðum síðum, og í seinna hálvleiki gav hetta eisini úrslit í, at vágbingar mistu ein mann. Beint eftir útvísingina fekk væl stríðandi heimaliðið tó enn betri fortreytir fyri sigrinum, tá Niklas Ludvig nakað uttanfyri brotsteigin smekkaði fríspark beinleiðis í málið. Hetta tók mest sum luftina úr sumbingunum, og tó at teir móti dystarenda royndu at leggja trýst á, so komu ikki fleiri mál.

Við sigrinum slapp VB sær upp um bæði LÍF og ÍF á stigatalvuni, og nú er av álvara farið at ljósna fyri framtíðini hjá liðnum. Komandi vikuskifti skulu teir spæla móti júst ÍF, og tó at talan verður um eina trupla uppgávu, so fer tosið helst at snúgva seg um heiðursmerki, heldur enn niðurflyting, um so er, at trý stig eisini spyrjast burtur úr teirri uppgerðini.

### Dysturin í tølum

**VB-Sumba 2-0 (1-0)**
1-0: Birgir Jørgensen
2-0: Niklas Ludvig



KÍ–ÍF 4–1 (2–0):

# Fuglfirðingar eru illa sperdir

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Yvirskriftin kundi tað sama verið, at KÍ er so mikið væl fyri, at tað meiri enn so er møguleiki fyri, at teir kunnu vinna heiðursmerki.

Einki skal takast frá KÍ avrikinum sunnudagin. Teir vunnu trivaligan og væl uppiborinan sigur. Men tað er merkisvert, at fótbólturin í Fuglafirði skal vera í so djúpum aldudali, sum avrikið í Klaksvík bar boð um, at hann er.

ÍF hevði ikki nógv at bjóða uppá. Teir spældu allar 90 minuttirnar í 2. geari. Pauli Jarnskor hevur royndirnar, men hann hevur sæð sínar bestu dagar sum spælari. Saman við honum á miðvøllinum vóru Eyðálvur R. Petersen og Høgni Zachariassen, sum báðir eru góðir við bóltinum, men tað sást einki til hægri gear, og íF átti onga turbo.

Hanus Eliasen minkaði fram ímóti dystarenda um munin til 4–1. Talan var um fínt langskot, og Hanus er ivaleyst mest eyðsýndi ÍF spælarin. Men støðið í fótbóltinum í Fuglafirði tykist vera soleiðis, at um góðir spælarar skulu hugsa um at royna seg í 1. deild, so skulu teir flyta í onnur feløg, og tí ber væl til at ímynda sær, at Hanus og kanska onkur annar fer at gera, sum Bartal Eliasen og Bárður á Lakjuni og aðrir, sum hava leitað aðra staðni hava gjørt.

KÍ hevði sunnudagin eina manning, sum ivaleyst hevði vunnið fleiri dystir í 1. deild. Á miðvøllinum vóru Erling Fles, Allan Joensen og Símun Joensen, sum væl og virðiliga settu seg á mótstøðumiðvøllin, og teir vóru við í trimum av fýra málum.

Erling Fles setti hol á í 19. minutti. Finn Baldvinsson sendi fríspark í brotsteigin, Símun Joensen var hægstur og stútaði upp á tvørs til Erling, sum lyfti upp um Rúna Joensen, ið kendi seg noyddan at leypa eitt sindur út úr ÍF málinum.

Olgar Danielsen økti til 2–0 eftir 32 minuttir. ÍF hevði akkurát havt teirra bestu fimm minuttir, tá KÍ veteranurin gjørdist einsamallur við ÍF málverjanum. Fuglfirðingar vildu vera við, at talan var um rangstøðu, men tað hildu dómari og linjuverji ikki, og Olgar var tryggur, tá hann setti millum beinini á málverjanum.

Eftir ein tíma økti Allan Joensen til 3–0 við frágera góðum frísparksmáli úr 28 metrum. Símun Joensen varð feldur í gjøgnumbroti, og Allan Joensen sendi omanfyri manngarðin og upp í hornið.

Sera arbeiðssami Erling Fles økti til 4–0, tá tað restaðu fimm minuttir. ÍF álop varð steðgað á egnari helvt, og eftir kontra varð Erling púra leysur í vinstru. Sera hegnisliga lyfti hann upp um ÍF málverjan.

ÍF minkaði um munin, men eftir síðsta bríksl er veruleikin, at ÍF trý umfør undan kappingarenda er nærri endaumfari at sleppa undan niðurflyting, enn teir eru endaumfari um uppflyting.

### Dysturin í tølum

**KÍ-ÍF 4-1 (2-0)**
1-0: Erling Fles
2-0: Olgar Danielsen
3-0: Allan Joensen
4-0: Erling Fles
4-1: Hanus Eliasen

**Máltindurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | FSV | 10 |
| Olgar Danielsen | KÍ | 10 |
| Eirikur Joensen | Sumba | 10 |
| Jónsvein Thomsen | B71 | 9 |
| Birgir Jørgensen | VB | 9 |
| Heini Heinason | ÍF | 8 |
| Tórálvur Poulsen | B36 | 7 |
| Bjarni Prior | FSV | 7 |
| Petur Sjúrðarberg | LÍF | 7 |
| Jens Erik Rasmussen | FSV | 6 |
| Kristian í Vági | LÍF | 6 |
| Høgni á Lakjuni | ÍF | 5 |
| Rúni Petersen | ÍF | 5 |
| Carl Høgnesen | B36 | 4 |
| Eyðun Højgaard | B36 | 4 |
| Eli Hentze | B71 | 4 |
| Ib Mohr Olsen | B71 | 4 |
| John Johansen | FSV | 4 |
| Danny Rasmussen | HB | 4 |
| Gunnar Mohr | HB | 4 |
| Rókur á Fløtum Jespersen | HB | 4 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 4 |
| Erling Fles | KÍ | 4 |
| Mortan Hansen | NSÍ | 4 |

NSÍ-B71 2-1 (1-1):

# Týdningarmikil stig til NSÍ

**NSÍ fekk øll trý stigini móti B71 í Runavík. Men tað var ikki nógv sum bendi á hetta fyrru helvtina av fyrra hálvleiki, tá B71 fekk brotspark og hevði møguleika at koma framum 2-0.**

2. DEILD
*Bjartur Nolsøe*

Tað sást ikki í byrjanini av dystinum, at NSÍ hevði plássið í 2. deild at berjast fyri. Runavíkingar virkaðu als ikki klárir tá dysturin byrjaði. Teir funnu ikki hvønn annan í samanspælinum, og í verjuni var opið so sandingar runnu ígjøgnum sum teimum lysti. Og tað gekk eisini galið longu tá 5 minuttir vóru farnir. Sandingar komu ígjøgnum í høgru síðu, og eitt innlegg endaði hjá Eli Hentze sum skallaði bóltin inn.

Sandingar hildu fram aftaná málið og komu framvegis lætt ígjøgnum verjuna hjá NSÍ. Tá 20 minuttir vóru farnir, bleiv ein sandingur feldur inni í brotsteiginum hjá NSÍ og dómarin dømdi brotstpark. Ein hevði varhugan av, at um hetta brotsparkið fór í mál, so kundi tað enda við einum skrædli. Tí heimaliðið var ikki við í dystinum og tískil var ilt at síggja, hvussu NSÍ skuldi koma aftur í aftur.

### Gongdin vendi

Men Eli Hentze sum annars er tryggur brotsparkskjútti, brendi brotsparkið og hetta skuldi vísa seg at venda gongdini í dystinum.

So við og við fekk NSÍ nógv betri stýr uppá sítt spæl, samstundis sum sandingar ikki megnaðu at halda ferðini uppi.

Tá okkurt um hálvur tími var farin, var tað NSÍ sum fekk brotspark. Ein sandingur og ein runavíkingur vóru í hornatøkum um ein bólt, og runavíkingurin bleiv skumpaður í ryggin.

Oddfríður Gaardbo setti brotsparkið í málið uttan møguleika hjá málmanninum at bjarga.

Restina av fyrra hálvleiki var tað mest runavíkingar sum royndu seg, og teir komu fram til onkrar góðar møguleikar, men fleiri mál komu ikki.

### Møguleikar til størri sigur

Í seinna hálvleiki var NSÍ klárt omaná. Sandingar fóru fram á vøllin og samstundis blivu allar markeringar sleptar á miðjuni og verjuni. Hetta førdi til at NSÍ ferð eftir ferð rann ígjøgnum B71-verjuna, og serliga í vinstru síðu hevði Eddie Mikkelsen nógv pláss.

Tá 10 minuttir vóru farnir kom tað sum skuldi vísa seg at verða sigursmálið. Sverri Justinussen fekk ein bólt inn um verjuna hjá B71, spældi tvørturum til Eddie Mikkelsen sum setti bóltin í mál.

Sjálvt um sandingar sendu fleiri mans fram á vøllin blivu teir ongantíð vandamiklir í seinna hálvleiki, og teir vóru ongantíð nær tí javnandi málinum. Hinvegin kom NSÍ fram til fleiri møguleikar, sum átti at givið teimum ein størri sigur.

Tað bleiv við 2-1 til NSÍ í einum dysti har B71 byrjaði best, men fall í fátt eftir at brotsparkið varð brent. Hevði hetta farið í mál, hevði talan óivað blivið um ein heilt annan dyst.

### Dysturin í tølum:

**NSÍ-B71 2-1(1-1)**
0-1: Eli Hentze
1-1: Oddfríður Gaardbo br
2-1: Eddie Mikkelsen

**Støðan, 2. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FS V | 15 | 11 - 3 - 1 | 46 | 9 | 37 | 36 |
| 2 | B36 | 15 | 6 - 5 - 4 | 26 | 26 | 0 | 23 |
| 3 | KÍ | 15 | 6 - 4 - 5 | 25 | 23 | 2 | 22 |
| 4 | Sumba | 15 | 6 - 3 - 6 | 21 | 27 | -6 | 21 |
| 5 | B71 | 15 | 5 - 4 - 6 | 25 | 18 | 7 | 19 |
| 6 | NSÍ | 15 | 6 - 1 - 8 | 15 | 28 | -13 | 19 |
| 7 | VB | 15 | 6 - 1 - 8 | 19 | 39 | -20 | 19 |
| 8 | ÍF | 15 | 5 - 3 - 7 | 32 | 33 | -1 | 18 |
| 9 | LÍF | 15 | 5 - 3 - 7 | 24 | 25 | -1 | 18 |
| 10 | HB | 15 | 4 - 3 - 8 | 24 | 29 | -5 | 15 |

# Góður GM-skalpur

Nýklaktu OL - telvararnir Hans Kristian Simonsen og Martin Poulsen eru farnir eina talvferð, og fyrsta kapppingin varð í Barcelona. Báðir eru teir við í oddinum, og hava telvað ómetaliga væl. Eisini hava báðir vunna á sama stórmeistara, og talvið hesa vikuna er GM-skalpurin hjá Martini.
Seinasta umfar verður telvað í skrivandi løtu, sum merkir at frágreiðing frá kappingini verður í mikudagsblaðnum.

**GM Viktor Moskalenko (2513) – Martin Poulsen (2160)**
**Sants Op 2002**

1.d4 d5 2.c4 c6 3.Rif3 Rif6 4.Ric3 dxc4 5.a4 Bf5 6.Rih4 e6 7.Rixf5 exf5 8.e3 Bd6 9.Bxc4 0-0 10.h3 Ribd7 11.g4 **(stórmeistarin ætlar sær at hvøkka Martin við hesum álopsleiki, men Martin heldur høvdið kalt)** 11...fxg4 12.hxg4 Fa5 13.Bd2 Bb4 14.f4 Rfe8 15.Ff3? **[15.g5 Rid5 16.Fc2 gevur hvítum lítlan fyrimun]** 15...Rad8? **[15...Rxe3+! 16.Bxe3 Bxc3+ er áhugavert, og gevur Martini fyrimun]** 16.g5 Rid5 17.Kf2 Bxc3 18.bxc3 Rixc3 19.Rxh7 Rie4+ **[19...Kxh7?? 20.Fh5+ Kg8 21.Fxf7+ Kh8 22.Rh1#]** 20.Kg1 Ff5 21.Rh2 Rixd2 22.Fh5 Kf8 23.Rxd2 Rxe3 24.Fh8+ Ke7 25.Fh4 **Rif8 (Martin hevur kláran fyrimun, og respektin fyri stórmeistaranum er tíbetur ikki somikið stór, at hann blakar hesa vinnandi støðu frá sær)** 26.Re1 Rxe1+ 27.Fxe1+ Ne6 28.Bxe6 fxe6 29.Fe3 Rh8 30.Kg2 Fb1 31.Fg1 Fe4+ 32.Kg3 Rh1 33.Ff2 Fh7 34.Fg2 Fh4+ 35.Kf3



Rh3+ 36.Ke4 Fe1+ og ukrainski stórmeistarin legði kongin vegna 37.Re2(Fe2)Fb1+38.Rc2 Rc3 **0-1**